# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 01.12.2014*

**Bygdaráðsfundur 01.12.2014 kl. 16.00 til kl. 18.45**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 119/2014 Fíggjarmál**

J.nr. 2014-0011-0046

*Onnur viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2015*

**Málslýsing**

Fíggjarnevndin mælir til, at høvuðstølini til fyrstu viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2015, hjá Nes kommunu, vera hesi:

| **Rakstur** | **2015** | **2014** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting | -3.977 | -3.833 | -144 | -3,8 |
| §2 Almanna- og heilsumál | -3.898 | -4.174 | 276 | 6,6 |
| §3 Børn og ung | -9.174 | -9.239 | 65 | 0,7 |
| §4 Undirvísing | -3.888 | -3.669 | -219 | -6,0 |
| §5 Mentan og frítíð | -2.755 | -2.776 | 21 | 0,8 |
| §6 Teknisk mál | -3.736 | -2.757 | -979 | -35,5 |
| §7 Kommunalt øki | -2.717 | -2.895 | 178 | 6,2 |
| **Rakstur í alt** | **-30.145** | **-29.343** | **-802** | **-2,7** |
| | | | | |
| **Íløgur** | | | | |
| §2 Almanna- og heilsumál | -222 | 0 | -222 | |
| §3 Børn og ung | -1.250 | -100 | -1.150 | |
| §4 Undirvísing | -100 | 0 | -100 | |
| §5 Mentan og frítíð | -500 | 0 | -500 | |
| §6 Teknisk mál | -1.935 | -568 | -1.367 | |
| §7 Kommunal virki | -950 | -874 | -76 | |
| **Íløgur í alt** | **-4.957** | **-1.542** | **-3.415** | **-221,5** |
| | | | | |
| **Rakstur og íløgur í alt** | **-35.102** | **-30.885** | **-4.217** | **-13,7** |
| | | | | |
| §20 Inntøkur v.m. | 33.295 | 31.884 | 1.411 | 4,4 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Úrslit** | **-1.807** | **999** | **-2.806** | **-281** |
| Afturgjald av skuld | 0 | -1.840 | 1.840 | 100 |
| **Av tøkum peningi** | **-1.807** | **-841** | **-966** | **-115** |

Fíggjarnevndin mælir til, at skattaprosentið er óbroytt 20,50 %, og at barnafrádrátturin er óbroyttur, kr. 5.000.

Fíggjarnevndin mælir til, at hallið fyri 2015 verður fíggjað við tøkum peningi, og at avdráttir fyri 2015 verður umfíggjaðir.

Kommunurnar yvirtaka eldraøkið at umsita pr. 1. januar 2015, men hava ikki fingið at vita hvussu nógvar inntøkur fylgja við útleggingini. Yvirtøkan er tískil ikki við í framlagda uppskoti.

**Tilmælir til fyrstu viðgerð**
Á fundi 31.10.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fyrstu viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2015 soleiðis, sum hon er uppsett.

Á fundi 31.10.2014 mælir Fíggjarnevndin til, at skattaprosentið, til fyrstu viðgerð, av Fíggjarætlanini fyri 2015, verður ásett at vera 20,5 %.

Á fundi 31.10.2014 mælir Fíggjarnevndin til, at barnafrádrátturin til fyrstu viðgerð av Fíggjarætlanini fyri 2015, verður ásettur at vera 5.000,00 kr. pr. barn.

**Tilmælini frá Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt á bygdaráðsfundi 03.11.2014.**

Í samband við aðru viðgerð hevur kommunan fingið vegleiðandi tøl í samband við yvirtøkuna av eldraøkinum, og eru hesi innarbeitt í fíggjarætlanina fyri 2015. Eisini verður nú rokna við at afturgjalda skuld.

**Broytingarnar í mun til fyrstu viðgerð eru hesar:**

| | **tkr.** |
|---|---|
| §2 Útreiðslur í samband við eldraøkið netto | -8.589 |
| §20 Inntøkur í samband við eldraøkið netto | 9.680 |
| **Rakstur í alt** | **1.091** |
| §2 Íløga keyp/søla av bygningum eldraøki netto | 4.000 |
| **Íløga í alt** | **4.000** |
| **Rakstur og íløgur í alt** | **5.091** |
| §25 Afturgjald av skuld | -2.319 |
| **Broytingar í mun til 1. viðgerð í alt** | **2.772** |

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 01.12.2014*

Fíggjarnevndin mælir til, at høvuðstølini til aðru viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2015, hjá Nes Kommunu vera hesi:

| **Rakstur** | **2015** | **2014** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting | -3.977 | -3.833 | -144 | -3,8 |
| §2 Almanna- og heilsumál | -11.707 | -4.174 | -7.533 | -180,5 |
| §3 Børn og ung | -9.174 | -9.239 | 65 | 0,7 |
| §4 Undirvísing | -3.888 | -3.669 | -219 | -6,0 |
| §5 Mentan og frítíð | -2.755 | -2.776 | 21 | 0,8 |
| §6 Teknisk mál | -3.736 | -2.757 | -979 | -35,5 |
| §7 Kommunalt øki | -2.717 | -2.895 | 178 | 6,2 |
| **Rakstur í alt** | **-37.954** | **-29.343** | **-8.611** | **-29,4** |
| | | | | |
| **Íløgur** | | | | |
| §2 Almanna- og heilsumál | 3.778 | 0 | 3.778 | |
| §3 Børn og ung | -1.250 | -100 | -1.150 | |
| §4 Undirvísing | -100 | 0 | -100 | |
| §5 Mentan og frítíð | -500 | 0 | -500 | |
| §6 Teknisk mál | -1.935 | -568 | -1.367 | |
| §7 Kommunal virki | -950 | -874 | -76 | |
| **Íløgur í alt** | **-957** | **-1.542** | **585** | **37,9** |
| | | | | |
| **Rakstur og íløgur í alt** | **-38.911** | **-30.885** | **-8.026** | **-26,0** |
| | | | | |
| §20 Inntøkur v.m. | 42.195 | 31.884 | 10.311 | 32,3 |
| | | | | |
| **Úrslit** | **3.284** | **999** | **2.285** | **228,7** |
| Afturgjald av skuld | -2.319 | -1.840 | -479 | -26,0 |
| | | | | |
| **Flutt til tøkan pening** | **965** | **-841** | **1.806** | **214,7** |

Fíggjarnvendin mælir til, at skattaprosentið er óbroytt 20,5%, og at barnafrádrátturin er óbroyttur, kr. 5.000.

Fíggjarnevndin mælir til, at yvirskotið fyri 2015 verður flutt til tøkan pening.

**Tilmælir**

Á fundi 25.11.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2015 soleiðis, sum hon er uppsett.

Á fundi 25.11.2014 mælir Fíggjarnevndin til, at skattaprosentið, til aðru viðgerð, av Fíggjarætlanini fyri 2015, verður ásett at vera 20,5 %.

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 01.12.2014*

Á fundi 25.11.2014 mælir Fíggjarnevndin til, at barnafrádrátturin til aðru viðgerð av Fíggjarætlanini fyri 2015, verður ásettur at vera 5.000,00 kr. pr. barn.

**Avgerð**
Tilmælini frá Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 120/2014 Fíggjarmál**
J.nr. 2014-0011-0038
**Málslýsing**
Reguleringar viðv. fíggjarætlanini fyri 2014

**Rakstur**

| | |
|---|---|
| §1 Kommunal Fyrisiting | -165.000 |
| §2 Almanna- & Heilsumál | -90.000 |
| §3 Børn & Ung | -110.000 |
| §4 Undirvísing | 120.000 |
| §5 Mentan & Frítíð | 40.000 |
| §6 Teknisk mál | 75.000 |
| §7 Kommunal virki | -230.000 |
| **Rakstur í alt** | **-360.000** |

**Íløgur**

| | |
|---|---|
| §6 Teknisk mál | 165.000 |
| §7 Kommunal virki | 230.000 |
| **Íløgur í alt** | **395.000** |
| | |
| **Rakstur og íløgur** | **35.000** |

**Inntøkur v.m.**

| | |
|---|---|
| §20 | -35.000 |
| | |
| **Úrslit av reguleringum** | **0** |

**Tilmæli**
Á fundi 25.11.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við reguleringunum á fíggjarætlanini fyri 2014.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 121/2014 Vegamál**

2014-0044-0076

**Málslýsing**

Onnur viðgerð av kostnaðinum fyri klárgering og asfaltring fyri ein part av Rókavegnum.
Tekniska deild hevur biðið um tilboð, frá EM Asfalt, uppá asfaltering av Rókavegnum.
Samlað tilboð uttan mvg er áljóðandi kr. 107.730,00.

Á fundi 21.10.2014 mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum frá EM Asfalt og at arbeiðið verður gjørt í ár.

Á fundi 31.10.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Tilmæli**

Á fundi 25.11.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av kostnaðinum at asfaltera á Rókavegnum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Mál nr. 122/2014 Trivnaðarmál**

J.nr. 2014-0031-0155

**Málslýsing**

Onnur viðgerð av eykajáttan til Barnaverndartænastuna . Eysturoyar Barnaverndartænasta søkir um eina eykajáttan fyri fíggjarárið 2014 uppá kr. 311.995,00. Herav er parturin hjá Nes kommunu kr. 64.474,00.

Á fundi 23.10.2014 mælir Trivnaðarnevndin til, at Nes kommuna rindar sín part av eykajáttanini.

Á fundi 31.10.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini, og at játtanin verður tikin av tøkum peningi.

Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Tilmæli**

Á fundi 25.11.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av eykajáttanini til Barnaverndartænastuna.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Mál nr. 123/2014 Fyrisitingarmál**
J.nr. 2014-0004-0024
**Málslýsing**
Bygdaráðsfundir 2015

Kommunan skal áseta og lýsa teir almennu bygdaráðsfundirnar fyri komandi ár. Eins og undanfarin ár verða bygdaráðsfundirnir mánadagar kl. 18.00. Uppskot til bygdaráðsfundirnar í 2015, sum skulu verða 10 í tali, eru:

Mánadagin 26. januar
23. februar
23. mars
20. apríl
18. mai
22. juni
31. august
28. septembur
26. oktobur
30. novembur

**Nevndarfundirnir í 2015 eru í viku:**
3-7-11-13-19-24-34-38-42-47

**Tilmæli**
Á fundi 25.11.2014 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við, at bygdaráðsfundirnir og nevndarfundirnir, fyri 2015, verða sum ásett í uppskotinum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 124/2014 Fíggjarmál**
J.nr. 2014-0011-0055
**Málslýsing**
Rakstrarætlan fyri 2015 hjá Kongshavnar havn.

Rakstrarætlan fyri 2015 hjá Kongshavnar Havn er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

**Høvuðstølini í fíggjarætlanini eru hesi:**

| **Inntøkur:** | **Ætlan 2015** | **Ætlan 2014** | **2013** |
|---|---|---|---|
| Netto inntøkur | 450.750,00 | 594.000,00 | 338.361,13 |

**Útreiðslur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Netto útreiðslur | -310.750,00 | -294.500,00 | -247.968,00 |
| Rentuinntøkur | 2.000,00 | 6.000,00 | 2.933,86 |
| **Ársúrslitið** | **142.000,00** | **305.500,00** | **93.326,00** |

**Tilmæli**
Á fundi 25.11.2014 mælir Fíggjarnevndin til, at viðmæla rakstraræltlanina, hjá Kongshavnar havn, fyri 2015.

**Súni í Hjøllum var úti meðan málið var viðgjørt.**

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Súni í Hjøllum var úti meðan málið var viðgjørt.**

**Mál nr. 125/2014 Mentanarmál**
J.nr. 2014-0024-0026
**Málslýsing**
Umsókn um stuðul

Í skrivi 22.09.2014 søkir Svimjifelagið Flot um at fáa somu tímar í svimjihylinum í 2015, sum felagið hevði í 2014, og undir somu treytum.

Frágreiðing um svimjifelagið Flot og fíggjarætlan fyri 2015 er viðheft.

**Tilmælir**
Á fundi 22.10.2014 mælir Mentanarnevndin til at játta Flot somu tímar fyri 2015, sum felagið hevði fyri 2014, og undir somu treytum.

Á fundi 31.10.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjanevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 126/2014 Skúlamál**
J. nr. 2014-0011-0053
**Málslýsing**
Fíggjarætlan skúlans 2015.
Námsfrøðiliga ráðið við Tofta skúla hevur viðgjørt fíggjarætlan skúlans til komandi skúlaár og hevur sent hana til Nes kommunu. Skúlastýrið hevur viðmælt fíggjarætlan skúlans fyri 2015, á fundi 01.10.2014.

**Tilmælir**
Á fundi 22.10.2014 mælir Mentanarnevndin til at játta Tofta skúla kr. 600.000 fyri fíggjarárið 2015, sum umfatar bæði fíggjarætlanina fyri skúlan og breytirnar.

Á fundi 31.10.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

Harumframt mælir Fíggjarnevndin til, at kr. 70.000 verða latnar til teldukeyp, sum er tað sama sum í 2014.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjanevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 127/2014 Havnin**
J.nr. 2014-0003-0031
**Málslýsing**
Havnameistari

Á fundi 21.10.2014 mælti Tekniska nevnd til at bíða við at søkja eftir nýggjum havnameistara. At tosað var við verandi havnameistara um at arbeiða niðursetta tíð, grundað á minni virksemi, og at síggja tíðina ann í eitt hálvt ár, fram til 1. mai 2015.

Tosað hevur verið við havnameistaran um avloysarastarvið, og spurt um hann er sinnaður at halda fram til 01. mai 2015, men við niðursettari tíð. Tað hevði hann áhuga í.

Avloysarastarvið, sum havnameistari, verður broytt til ¾ tíð, frá 01. januar til 01. mai 2015.

**Tilmælir**
Á fundi 18.11.2014 mælir Tekniska nevnd til, at avloysarastarvið, sum havnameistari, verður longt fram til 01. mai 2015, og at havnameistarin verður settur í ¾ tíð frá 01. januar til 01. mai 2015.

Á fundi 24.11.2015 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Niclas Davidsen var úti meðan málið var viðgjørt.**

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 01.12.2014*

**Mál nr. 128/2014 Jarðarmál**

J. nr. 2008-0041-0007

**Málslýsing**

Grundstykkini á Lýðarsvegi

Á fundi í Teknisku nevnd 18.11.2014 var málið um grundstykkjaprísin á Lýðarsvegi umrøddur. Tekniska nevnd metir, at tað er neyðugt at lækka grundstykkjaprísin, fyri at fáa grundstykkini á Lýðarsvegi seld.

Í 2008 var arbeiðið liðugt við at gera 24 grundstykkir byggibúgvin á Lýðarsvegi. Avgjørt var, áðrenn arbeiðið byrjaði, at grundstykkjaprísurin skuldi verða kr. 297.500 pr. grundstykki, sum svaraði til kostprísin.

Grundstykkini eru í miðal 650 m² til støddar. Tað skal viðmerkjast, at nakað av planeringsarbeiði skal til afturat, áðrenn bygging kann byrja.

Tað vísti seg, at eftirspurningurin eftir grundstykkjum í Nes kommunu, sum í restini av Føroyum, minkaði burtur í einki í 2008. 2 grundstykkir blivu seld beinanvegin, herav sethús er bygt á annað.

Í Nes kommunu er stórt ynski um at fáa gongd í sethúsabyggingina á Lýðarsvegi. Mett verður, at um prísurin á grundstykkjunum lækkar, so kemur gongd á sølu av grundstykkjum aftur.

Byggibúnu grundstykkini á Lýðarsvegi binda nógvan pening hjá kommununi, og hevur tað tí stóran týdning fyri kommununa, at grundstykkini verða seld soleiðis, at kommunan fær nakað av peninginum aftur fyri grundstykkini, og at kommunan fær fleir íbúgvar, sum kunnu verða við til at hækka um skattainntøkugrundarlagið hjá kommununi.

**Tilmælir**

Á fundi 18.11.2014 mælir Tekniska nevnd til, at lækka prísin við kr. 100.000 niður í kr. 197.500, og at tey bæði grundstykkini sum eru seld, fáa sama avsláttur, og verða endurgoldin tá fyrsta grundstykki er selt, eftir at grundstykkjaprísurin er lækkaður.

Á fundi 24.11.2014 tekur Vinnunevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

Á fundi 25.11.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælunum frá Teknisku nevnd og Vinnunevndini.

**Avgerð**

Tilmælini frá Teknisku nevnd, Vinnunevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 129/2014 Havnin**
J.nr. 2013-0046-0065
**Málsviðgerð**
Reglugerð fyri bátapláss

Vinnunevndin hevur arbeitt við eini reglugerð fyri bátapláss á landi og sjógvi í Tofta havn.

Reglugerðin er galdandi fyri allar báteigarar, sum hava fingið nýtslurætt til bátapláss í Tofta havn, og er ætlað sum hjálp hjá Tofta havn ella umsjónarmanni í viðgerð og støðutakan um bátaplássini, um leigumálið ikki verður viðlíkahildið.

**Tilmæli**
Á fundi 24.11.2014 mælir Vinnunevndin til at taka undir við reglugerðunum, fyri bátapláss á landi og sjógvi, soleiðis sum tær eru uppsettar, og at hesar koma í gildið 01. januar 2015.

**Avgerð**
Tilmælið frá Vinnunevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 130/2014 Havnin**
J.nr. 2014-0046-0073
**Málsviðgerð**
Leigugjald fyri bátapláss o.a.

Vinnunevndin hevur gjøgnumgingið leigugjøldini fyri bátapláss, egningaskúrar, leiga av økjum til bingjur/skiftilastir, og leiga av øðrum økjum á havnalagnum. Eisini hevur verið hugt uppá havnagjald, brúgvagjald, vørugjald, grønt gjald og onnur gjøld í samband við Tofta havn.

**Tilmæli**
Á fundi 24.11.2014 mælir Vinnunevndin til, at gjaldið fyri leiga øki til bingjur/skiftilastir 20 fót hækkar frá kr. 225,00 upp í kr. 450,00 pr. ár, og fyri bingjur/skiftilastir 40 fót hækkar frá kr. 450,00 upp í kr. 900,00 pr. ár. Gjøldini fyri bátapláss, egningarskúrar, leiga av øðrum økjum á havnalagnum, og gjøldini viðv. havnini annars verða óbroytt.

**Avgerð**
Tilmælið frá Vinnunevndini var einmælt samtykt.